

- Vit hava havt góðar samrøður bæði við Nes kommunu og Sjóvar kommunu, og vit í Runavíkar kommunu eru fyri, at Skálafjørðurin verður lagdur saman í eina kommunu, sigur Hans Jacob Lamhauge, borgarstjóri Mynd: Vilmund Jacobsen

# Skálafjørðurin ein kommuna

**– Eg vænti ikki, at øll Eysturoyggin sjálvboðin tekur avgerð um at leggja saman í eina kommunu í komandi valskeiði, men eg vænti, at vit fara at síggja Eysturoynna sum tvær kommunur innan langt um leingi. Her koma nýggj fólk, og vit hava nýggjar tíðir, sigur fráfarandi borgarstjórin í Runavíkar kommunu, Hans Jacob Lamhauge**

EYSTUROY
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hans Jacob Lamhauge hevur verið aktivur í kommunalpolitikki seinastu 32 árini. Hann varð fyrstu ferð valdur, tá hann var 28 ára gamal. Nú er hann seksti og hevur gjørt av ikki at stilla uppaftur á kommunuvalinum, 11. november.

– Hetta hevur verið ein áhugaverd tíð í kommunalpolitikki – heilt frá fyrsta degi, tá eg fyrstu ferð varð valdur í 1976. Ikki minst seinastu tvey árini, nú eg havi sitið sum borgarstjóri, hava verið sera áhugaverd. Øll árini hevur tú følt, at økið hevur verið í menning, og at tú sum fólkavaldur at umboða hesar bygdir hevur verið við til at gera mun.

## Góður stuðul

Hans Jacob heldur, at nú árini innan kommunalpolitikk eru vorðin 32 í tali, er tíðin komin til at finna hurðina sjálvur.

– Eg havi eisini upptikið ein sess í býráðnum í 32 ár, og nú haldi eg, at onnur eiga at sleppa fram at og fáa henda sessin, sum hevur verið mín í so langa tíð.

Sitandi borgarstjóri í Runavíkar kommunu er afturvaldur á hvørjum vali seinastu átta kommunuvalini.

– Tey fyrstu valini visti tú nøkulunda, hvør valdi teg, men sum árini eru gingin hevur verið verri at sagt, hvørjir stuðlarnir eru. Eg eri tó altíð væl stuðlaður í Lamba, Søldarfirði, Glyvrum og eisini her úti í miðøkinum í kommununi. Nú eg gevist, eri eg takksamur fyri øll hesi ár, og eg eri sera takksamur mótvegis øllum teimum, sum so trúliga hava stuðlað mær.

Hann vísir á, at tað eru tríggir listar í Runavíkar kommunu til valið hesaferð - ein skálalisti, sum eisini fevnir um smáu bygdirnar norðanfyri, ein søldarfjarðarlisti og so ein listi í miðøkinum.

Tað eru bert tríggir av 11 sitandi býráðslimum, sum stilla uppaftur. Hesi eru Klæmint Østerø, Hans Petur Ellingsgaard og Kristian Gaardbo.

– Á øllum listum eru kvinnur og menn, tó at eingin listi hevur so góða kvinnuliga umboðan, sum listin í Søldarfirði, ið hevur fýra kvinnur og fýra menn, sigur borgarstjórin.

Spurdur, um hann hevur nakað boð upp á, hvør verður nýggjur borgarstjóri í Runavíkar kommunu eftir komandi val, er Hans Jacob als ikki avgjørdur.

– Nei, tað tori eg ikki at geva mítt boð upp á. Teir tríggir, sum stilla uppaftur, fara ivaleyst at bjóða seg fram, og tað fara onnur og nýggj andlit ivaleyst eisini.

Borgarstjórin sigur, at tað eru nógv áhugaverd og væl kvalifiserað fólk á teimum trimum listunum og fara nøkur av hesum at fáa atkvøður, sum tey ivaleyst fara, er eisini væntandi, at tey fara at bjóða seg fram, tá tann tíðin kemur.

## Samanlegging

Nú Hans Jacob Lamhauge gevst í politikki, hevur hann einki ímóti at siga sína hugsan um, hvat hann heldur fer at tæna Skálafjørðinum og Eysturoynni best í longdini.

– Eg eri fyri, at Skálafjørðurin verður ein kommuna, og eg vænti, tá komandi valskeið fer at nærkast endanum, at semjur eru gjørdar um at leggja Eysturoynna saman í tvær kommunur.

Hann væntar hinvegin ikki, at Eysturoyggin sjálvboðin verður løgd saman í eina kommunu eftir lutfalsliga so stuttari tíð.

– Vit hava havt góðar samrøður bæði við Nes kommunu og Sjóvar kommunu, og vit í Runavíkar kommunu eru fyri, at Skálafjørðurin verður lagdur saman í eina kommunu. Hinvegin hava hinar báðar kommunurnar við ytru armarnar ikki verið so sannførdar, tó at tær einki hava ímóti at viðgera spurningin.

Hans Jacob sigur, at kommunurnar hava eisini havt eina møguliga samanlegging frammi, tá tær allar hava verið savnaðar á fundi.

– Men niðurstøður eru ongar gjørdar í so máta, og soleiðis hava heldur ongar veruligar samráðingar verið.

Sjálvur sær borgarstjórin stórar møguleikar og fyrimunir í eini samanlegging – ikki minst, nú mangt bendir á, at glið fer at koma á verkætlanina við Skálafjarðartunlinum.

– Ein slíkur tunnil verður ein stór avbjóðing fyri økið, og eg ivist ongav løtu í, at vit saman høvdu verið best før fyri at tikið ímóti henni.

Hans Jacob Lamhauge vísir á, at nógv er broytt í kommununum, síðan gomlu slitini millum ávikavist Runavíkar kommunu og Nes kommunu og millum Skála kommunu og Sjóvar kommunu.

– Samfeløgini er broytt, og infrastrukturin er nógv broyttur og mentur. Hetta eru nýggjar tíðir, og her eru nógv nýggj fólk. Í dag hevur tað ikki so stóran týdning, hvar aktivitetirnir liggja, sum tað hevði í sínari tíð, tá togast varð um slíkt, sigur sitandi borgarstjórin í Runavíkar kommunu.